Hugleiðing á tveimum hjólum:

# Suðuroyingar fingu ikki tunnilsfrítt

**Leygardagin fór eitt fylgi av motorsúkklum úr Vági og av Tvøroyri við kós móti Klaksvík og nýggja Norðoyatunnlinum. Dýrdarveðrið leygardagin gjørdi túrin ógloymandi. Nýggi tunnilin er stásiligur og at fylgið slapp yvirum við ellisakførum fyrrapartin gjørdi mun, tí so kundi koyrast í Norðoyggjum leygardagin innan sjálvt hátíðarhaldið. Hóast onkur mundi ligið eftir umborð á Smyrli, tí viðkomandi ikki helt vera neyðugt at keypa ferðaseðil, men at ferðin var ókeypis, eins og aðrastaðni henda dag, so eydnaðist ferðin til fullnar allan vegin og gjørdist hetta ein ógloymandi motorsúkkluferð yvir fjøll, undir sund og á bátadekki**



*Klokkan 06:05 savnaðust eini 15 motorsúkklur úr Porkeri og Vági við Posthúsið í Vági og ferðin gekk norður eftir oyggj*

FERÐAFRÁSØGN
*Dagfinn Olsen*
dagfinn@sosialurin.fo

Klokkan 06:05 savnaðust eini 15 motorsúkklur úr Porkeri og Vági við Posthúsið í Vági og ferðin gekk norður eftir oyggj. Kósin varð greið. Fyrst Smyril á Krambatanga, har motorsúkklur av Tvøroyri eisini komu umborð. Síðani úr Havn til Klaksvíkar ígjøgnum nýggja Norðoyatunnilin.

Í skemti hava limirnir í fylginum givið sær sjálvum heitið Storm Boys, men hvussu er og ikki, so hevur heitið fest seg og er hangandi.

### Ikki ókeypis fyri suðuroyingar

Alt gekk sum eftir ánni. Veðrið var gott og túrurin við Smyrli góður. Tað gav tó at bíta, tá onkur mundi ligið sjóvarfallið av sær, tí viðkomandi ikki hevði hugsað um at keypa ferðaseðil. Viðkomandi helt nevniliga – kanska ikki heilt av órøttum – at tað var ókeypis at ferðast í Føroyum henda dagin. Lýst hevði verið við, at ókeypis var undir sundini og við Teistanum og Smyrli.

Tað sum viðkomandi ikki visti var, at tað ikki gjørdist ókeypis við Smyrli fyrr en sunnudagin. Og neyvan kann nakar siga viðkomandi ringan fyri at hava hildið seg til logiskan hugsunnarhátt, ið vildi sagt, at tá hátíðarhaldið er leygardag, so er tað hendan dagin, at suðuroyingar - eins og onnur – sleppa ókeypis.

Men sum ein Klaksvíkingur segði seinni á degi: - Óluksaliga løgið. Hvat skulu suðuroyingar í hópatal gera her norðuri sunnudagin? Eta restir og síggja norðoyingar hava timburmenn?

### Presturin, súkklan og hundurin

Hvussu var og ikki. Hóast gjaldast skuldi, tí ein kom úr ávísum parti av landinum, so setti hetta ikki dempara á ferðina.

Skemtiligt var t.d. at hitta hvalbiarprest á flottari motorsúkklu umborð á Smyrli. Knappliga stóð hann á bildekkinum við lítlum, fittum hundi í føvninginum. Hvar kom hesin frá? Jú, prestur hevur vant hundin væl og hevur hesin rættiliga fingið bensin í blóðið, tí tá prstur koyrir motorsúkklu, so situr hundurin í aðrari taskuni aftanfyri á motorsúkkluni!!

Og brátt sást eitt fylgi á eini 17 motorsúkklur fara úr Havn og norðureftir tíðliga fyrrapartin leygardagin.

Tað undraði suðuroyingar, so vánaligar koyriumstøðurnar eru í støðum norðanfyri, í mun til gamla og smala, men tó slætta, asfaltið í Suðuroynni.

Við tunnilin í Kaldbaksbotni hava teir fílað asfalt omanav vegnum og onki er koyrt í aftur. Sama er galdandi inni í tunnlinum norðuri við Streymin.

Fyri ein, ið koyrir á motorsúkklu hevur hetta við sær, at hjólini skifta millum allar tær smáu rufflurnar í vegnum og tað kennist, sum fer súkklan fyrst til vinstru og síðani høgru við skjótum millumbilum. Við øðrum orðum, so kemur slingur í valsin, og tað er hvørki heppið ella avslappandi og er neyvan heldur í samsvar við ferðslutrygdina.

### Fyrst ígjøgnum

Avtalan var, at klokkan 11 slapp fylgið av hesum motorsúkklum sunnast úr Føroyum ígjøgnum Norðoyatunnilin saman við elisakførum, ið fóru fyrstuferð undir sundið tá. Og flestu súkklurnar hava aldur



